# Tríggir serbar til 07 Vestur

Eivin Jacobsen, nevndarformaður í 07 Vestur, staðfestir fyri vágaportalinum, at ætlanin er at fáa nýtt fólk í summarsteðginum. - Spurningurin er ikki, hvør vinnur seinnu hálvu. Vit hava ikki vunnið fyrru hálvu, og tað er nú umráðandi, at vit standa okkum væl eftir summarsteðgin. Soleiðis sigur Eivin Jacobsen, nevndarformaður í 07 Vestur, við Vágaportalin í dag. Hann staðfestir, at felagið ætlar at fáa tríggjar serbar afturat núverandi leikarahópinum. Og tað verður, sambært Eivin Jacobsen, eingin broyting í venjaratoyminum. - Vit hava álit á Piotr Krakowski og stuðla honum framvegis, sigur nevndarformaðurin.



# Vælkomupakkar klárir

Nú er knøpp vika, til setanin av Oyggjaleikunum 2009 verður í Mariehamn í Álandi. Men longu um vikuskiftið vóru vælkomupakkarnir klárir til tey 3.200, sum antin eru luttakarar ella hjálparfólk. Í pakkanum eru ymiskir lutir og pakkin stendur klárur, tá ferðaløgini koma til Álands. Pakkarnir eru gjørdir í íshøllini í Mariehamn. Tað eru høvuðsstuðlarnir og stuðlar úr Álandi, ið hava goldið fyri innihaldið í teimum 3.200 kassunum.



Sigurin hjá KÍ á Argjum leggur upp til sannan trunkabardaga í botninum

Mynd: Einslistir/Hilmar Jan Hansen

# KÍ bjargar spenninginum

**HB-sigurin í Gøtu hevur mest sum tikið FM-spenningin úr Vodafone-deildini, men í botninum syrgdu klaksvíkingar fyri, at spenningurin um niðurflyting væl kann økjast**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

13 gjørdist eydnutalið hjá KÍ, sum loksins kreyp sær av aftasta sessinum í Vodafone-deildini.

Enn er KÍ statt undir niðurflyingarstrikuni saman við 07 Vesturi, sum bert kann takka sær sjálvum fyri, at teir ikki tóku trý stig við úr Gundadali leygardagin.

Men sigurin á AB hevði mest sum ótrúliga stóran týdning í royndunum hjá klaksvíkingum at sleppa sær út botninum.

Enn er ikki veruligt samband upp til liðini oman fyri strikuna. Men vinnur KÍ næsta lagnudystin, sum er móti ÍF mikukvøldið, er fjarstøðan upp til lívbjargandi áttanda plássið bara tvey stig. Og tað er nú ein serdeilis stórur munur sammett við støðuna, sum KÍ hevur verið í at kalla alt kappingarárið.

### Gullið avgjørt

Tað eru helst fleiri – ikki minst í HB – sum enn ikki vilja vera tað allar minsta við uppá, at spurningurin um gullið longu er avgjørdur.

Sjálvandi kann tað enn gleppa hjá HB, men við sigrinum í Sarpugerði syrgdu teir altso fyri, at munurin niður til næstu liðini nú er átta stig. Og tað verður serstakliga trupult hjá nøkrum av hinum liðunum at gera nakað sum helst við tað.

Umframt at kappingarneytarnir hava snávað hvør í sínum lagi, so hevur HB altso vunnið sær risa fyrimunin við útisigrum móti EB/Streymi og Víkingi og heimasigri móti NSÍ, og tað borgar eisini fyri einum kvaliteti, sum snægt sagt ger tað órealistiskt, at teir fara at tveita leiðsluna fyri borð næstu 14 umførini.

Tað ber við sær, at restin av feltinum skal renna kapp um sekunderu heiðursmerkini og atgongdina til Europa. Í løtunik tykjast toftamenn at vera best fyri í teirri kappingini, men ein vansi er tað heilt víst hjá teimum, at hópurin er somikið smalur, at skaðar kunnu raka serstakliga hart. Hinvegin hava toftamenn ikki nakra europiska uppgávu ella nakra steypafinalu at hugsa um, og tað kann verða ein fyrimunur.

EB/Streymur, NSÍ og Víkingur eru tó eisini við í feltinum, sum jagstrar europisku plássini, og við verandi gongd tykist sannlíkt, at vit mest sum hvørt umfar hava okkurt innanhýsis brak á skránni.

### Tætt í botninum

Og so er tað botnurin, sum altso kann gerast nógv tættari. B36 hevur vunnið sær fýra stig seinastu tveir dystirnar, og tí eru teir fyribils aftur í tryggari legu. Men talan verður um sera truplar uppgávur hjá teimum komandi umførini.

Hinvegin er tað av álvara farið at brenna undir AB og ÍF, og nú skal altso ikki nógv til, áðrenn tey bæði av álvara eru partur av niðurflytingarstríðnum, sum í ár væl kann gerast ein sannur trunkabardagi

Miku- og hósdagin verður seinasta umfarið hesumegin summarsteðgin spælt. Tá eru dystirnir KÍ-ÍF, 07 Vestur-AB, EB/Streymur-Víkingur, AB-KÍ, HB-B36 og B68-NSÍ.

## Sannførandi talvsigur

Føroyska landsliðið fekk eina frálíka byrjan í Europa-kappingini fyri smátjóðir, sum verður telvað í Andorra. Mótstøðuliðið í 1. umfari var Malta, men maltesiskuoyggjabúgvarnir fingu ongantíð fótin fyri seg og Føroyar vunnu trygt ½ - 3½.

Við sigrinum hava Føroyar lagt seg á odda í kappingini. Rógvi Egilstoft Nielsen 1936 telvaði sítt fyrsta talv á landsliðnum og hann varð fyrstur liðugur í dag. Við hvíta fólkinum vann Rógvi sær eina finnu heilt tíðliga, sum seinni endaði við klárum fyrimuni ímóti Peter B. Sammut 2025, og fyrsta sigrinum til Føroyar.

Helgi Dam Ziska 2422 á fyrsta borði telvaði við svarta fólkinum móti Andrew Borg 2103. Styrkismunurin kom ikki beinanvegin til sjóndar, men Helgi telvaði trygt og einfalt sigurin heim.

Joseph Gauci 2093 hevði hvítt móti John Rødgaard 2370. John hevði ongantíð trupulleikar í talvinum, og fekk spakuliga arbeitt sær fyrimun, ið endaði við býtisfyrimuni og vinnandi støðu. Heini Olsen 2383 - David V. Cilia 2094.

Heini telvaði eitt gott talv og hevði frálíka støðu. Men mitt í talvinum hendi eitthvørt lógið, sum gav svørtum avgerandi fyrimun. Heini kempaði tó við øllum hann dugir, og tað er ikki so lítið, og megnaði at fáa ein javnleik. Tí hava Føroyar fingið fyrsta sigurin. Mánadagin verður dupultumfar telvað.

-eij